# Nýggjur Skoda Octavia seinni í ár




*Fyrsta myndin av nýggja Skoda Oktavia, sum kemur á marknaðin seinni í ár. Bilurin verður nakað størri enn forgangarin*

**Skoda hava nú víst fyrstu myndina av einum nýggjum Octavia, sum kemur á marknaðin seinni ár. Bilurin verður frumsýndur á altjóða bilaframsýningini í Geneve í mars.**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Seinni í ár kemur ein nýggjur Skoda Octavia á marknaðin. Bæði hvat designi og teknologi viðvíkur verður talan um ein sera framkomnan bil.

Bilurin verður nakað størri enn forgangarin, aksilfrástøðan er eisini størri, og viðførisrúmið er vaksið frá 528 litum til 560.

Tríggir bensin og tveir dieselmotorar varða á skánni í fyrsta umfari. Bensinmotorarnir verða: 1,6 MPI við 102 hk, 1,6 FSI við 115 hk, og 2,0 FSI við 150 hk, dieselmotrarnir verða: 1,9 TDI við 105 hk og 2,0 TDI við 140 hk.

Nýggi Octavia verður frumsýndur á altjóða bilaframsýningini í Geneve í mars, og danski importørurin roknar við, at bilurin verður á Copenhagen International Motor Show í mai. Bilurin kemur á danska og føroyska marknaðin seinni í ár.

*Kelda: www.semler.dk*

# Lacetti avloysir Daewoo Lanos




*Daewoo Lacetti. Bilurin er teknaður hjá italsku designfyritøkuni Italdesign. Hetta er fyrsti Daewoo, sum ikki hevur tað kølaragittarið, sum hevur eyðkent Daewoo í nógv ár*

**Út við tí gamla og inni við tí nýggja tykist vera slagorðið hjá koreansku Daewoo bilverksmiðjuni. Fleiri nýggj modell eru komin á marknaðin seinastu tíðina. Nú verður Lanos avloystur av einum heilt nýggjum Lacetti**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Fleiri nýggir Daewoo bilar eru komnir á marknaðin seinastu tíðina, fyrst komu Kalos og Evanda, síðan kom Nubira, og nú verður Lanos avloystur av einum heilt nýggjum Lacetti.

Við samstarvinum við General Motors eru Daewoo rættuliga komnir fyri seg aftur. Lacetti er teknaður hjá italsku designfyritøkuni Italdesign við evropeiskum designi.

Ólíkur øðrum Daewoo er hetta fyrsti bilurin, sum ikki hevur eyðkenda Daewoo kølaragittarið. Bilurin er ein hatchback við fimm hurðum, hann er 4,30 m langur, viðførisrúmið er 275 litrar, og við baksetrinum lagt niður verður tað heilar 1045 litrar.

Stórur partur av el-skipanini er gjørdur í samstarvi við Bosch í Týsklandi.

Bilurin verður á danska og føroyska marknaðinum í apríl.




*Lacetti er ein hatchback við fimm hurðum og evropeiskum designi*

# ítróttur

Nr. 24 • hósdagur • 5. februar 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

# Franskar stjørnur í september



*Eftir stórdystin móti Týsklandi í fjør, verður tað í ár Frakland, sum kemur á vitjan. Hetta verður 8. september*

**Føroyar fáa bert ein heimadyst í 2004. Hetta verður tá Frakland kemur á vitja í september mánaði**

HM-UNDANKAPPINGIN
*Jákup Mørk*

Týsdagin vóru umboð fyri Fótbóltssambandið á fundi í Dublin, har dystarskráin fyri komandi HM-undankappingina skuldi leggjast.

Føroysku umboðini á ferðini vóru formaðurin í landsliðsnevndini,Jens Erik Magnussen, aðalskrivarin, Ísak Mikladal og landsliðsvenjarin, Henrik Larsen.

Sum skilst, so var talan um ein rættiliga harðan fund, har tað serliga vóru stóru londini í bólkinum, sum royndu at leggja dystirnar soleiðis, sum tey helst vildu hava teir.

Í hesum sambandi mundi orðið hjá føroyska bólkinum ikki viga tað heilt stóra, men tó munnu tey í FSF iðra seg um, at tað ikki í størri mun eydnaðist at samskipa útidystirnar, soleiðis at ferðaútreiðslurnar til hesar kundu haldast so lágt sum gjørligt.

Ikki minst høvdu føroysku umboðini í hyggju at fáa ferðirnar til Cypros og Ísrael avgreiddar í einum, og fram til einaferð langt út á seinnapartin, var hetta eisini tað, sum lá í kortunum, men at enda máttu Føroyar tó boyggja seg fyri øðrum ynskjum.

Tí varð úrslitið at enda, at tað bert verður tað einu ferðina, at Føroyar skulu á dupultferð uttan fyri landoddarnar. Hetta verður í oktober mánaði í ár, tá landsliðið vitjar í bæði París og Dublin, og júst tann ferðin man uttan iva vera ein, har hópur av føroyskum fótbóltsfjepparum hava ætlanir um at fylgja við. Ikki minst, tá talan samstundis er um dystir, sum raka inn í heystfrítíðina hjá skúlunum.

## Stórdystur í góðari tíð

Fyri heimligu áskoðararnar er lítið at ivast í, at stóri dysturin hesa undankappingina verður tann á heimavølli móti Fraklandi. Hesin verður leiktur 8. september, og man tað allar helst far at verða Tórsvøllur, sum tá verður nýttur sum undirlag.

Og her má so sigast, at føroyska sendinevndin hevur havt hepnið við sær. Tað ber neyvan til at ímynda sær, at Føroyar sum so fara at skala fronsku heimsstjørnurnar, men tað er ein sannroynd, at heimligu leikararnir eru best fyri um hetta mundi, samstundis sum kappingarnar í eitt nú Fraklandi, Onglandi, Italia og Spania tá júst eru byrjaðar, og at leikararnir tá kanska ikki eru heilt á toppinum.

Komandi ár verða so fýra heimadystir á skránni. Sveis í mai, Írland í juni, Cypros í august og so endiliga Ísrael í september mánaði. Seinasti dysturin verður útidysturin móti Ísrael, sum Føroyar soleiðis koma at hitta tvær ferðir innan ein mánað. Men tað verður so ikki fyrr enn næsta ár. Í ár verður tað fyrst og fremst Frakland, sum fer at seta dagsskránna, og hvør veit, um tað ikki eru verjandi europameistararnir, sum fara at vitja á Tórsvølli í september!

### Dystirnir

04.09.04 Sveis-Føroyar
08.09.04 Føroyar-Frakland
09.10.04 Cypros-Føroyar
13.10.04 Írland-Føroyar
04.05.05 Føroyar-Sveis
08.06.05 Føroyar-Írland
17.08.05 Føroyar-Cypros
03.09.05 Frakland-Føroyar
07.09.05 Føroyar-Ísrael
08.10.05 Ísrael-Føroyar

# Havnarmenn døma finalurnar

**Tað verða dómarapør úr Neistanum og Kyndli, sum skulu leiða báðar finaludystirnir leygardagin**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Hondbóltssambandið boðaði týsdagin frá, hvørjar dómarar tey hava sett at døma tær báðar steypafinalurnar leygardagin.

Og ikki heilt óvæntað, so verða tað tey bæði føstu dómarapørini hjá Neistanum og Kyndli, sum nú hava fingið hesa uppgávuna.

Neistamenninir eru Kristian Johansen og Sámal Hansen, og teir báðir fara at taka sær av dømingini hjá kvinnunum. Hjá monnunum verða tað so Hannis og Uni Wardum, sum fara at blása í floyturnar.

Sum nevnt, so var talan ikki um nakað óvæntað val. Fyrst og fremst tí júst hesi bæði dómarapørini seinnu árini hava verið tey avgjørt stinnastu, og hartil kemur so tað, at hvørki Neistin ella Kyndil eiga umboð í steypafinalunum í ár, og at sambandið við feløgini tí ikki er nakar trupulleiki hjá nøkrum av dómarunum.

Ætlanin var annars í sambandi við steypafinaluni, at Frank Smith, sum frammanundan hevur samstarv við felagið hjá hondbóltsdómarum, skuldi koma upp sum eygleiðari til finaludystirnar.

Hetta verður tó av ongum í hesum umfari, tí Frank í løtuni hevur eina sera tætt-pakkaða skrá, og tí illa hevði stundir at koma upp hetta vikuskiftið. Ístaðin er ætlanin, at fyrrverandi toppdómarin skal koma upp til Føroya seinni í vár, har hann fer at nýta eitt vikuskifti til skeið og prøvtøku fyri hondbóltsdómarar.

Heilt sleptir upp á fjall verða finaludómararnir tó ikki. Eyðun Samuelsen hevur seinastu mánaðirnar virka sum eygleiðari, og tann leiklutin fer hann eisini at hava leygardagin, og saman við honum fer Hjalmar Petersen at meta um avrikini hjá svørtklæddu monnunum.



*Tað verða teir báðir Wardum-beiggjarnir, sum fara at døma mansfinaluna, tá steypakappingin í hondbólti skal avgerast leygardagin*